DAGSINS MEINING

Buktina og báðar endar

Við alliansuni millum A og D hevur løgmaður buktina og báðar endar. Tað er einasta greiða niðurstøða eftir valið. Bara um D tekur stuðulin til A aftur kann hetta broytast. Tað er neyvan hugsandi. Í hesi støðu kann eingin arbeiðsfør samgonga skipast uttan góðkenning frá Kallsberg.

Hóast andstøðan fyribils hevur sett løgmann í skák, kann hann bíða við avgerðini, hvønn hann vil samstarva við til eftir formansrunduna. Leggur løgmaður kongin í fyrsta talvinum kann hann bara blokera allar aðrar samgongumøguleikar í næsta talvinum og bíða, til hann sjálvur aftur fær initiativið. Og tá er hann bæði løgmansevni og kann velja sínar samgongupartnarar. Til meiriluta krevst so bert ein tinglimur aftrat, er verandi samgongu grundarlagið. Og Jenis er nóg mikið. Løgmaður hevur úttalað, at hann fyrst og fremst hugsar um at tryggja sínum veljarum so nógva ávirkan (les makt) sum gjørligt. Og bókstaviligt merkir tað, at hann við at velja Jenis varðveitir mest av síni makt og ávirkan. Tá gongur Jenis beina leið inn í ein tóman landsstýrisess hjá D og kann geva honum eina dimentión aftrat við at knýta familja upp í almanna- og heilsumálastýrið. So líkatil kann tað vera. Jenis hevur alt at vinna, einki at tapa. Løgmaður sleppur tá undan at lata C av sínum málsøkjum. Og afturfyri at E kann varðveita sítt, stendur E í takkarstøðu til løgmann. Allir standa takkarstøðu til løgmann, fyrst D, síðani E og at enda H. Og henda takkarstøða ger, at løgmaður hevur nærum totalt vald. Eitt øvugt orð frá Høgna ella Jenisi, og teir eru out. Uttanfyri standa svangir flokkar, sum vilja loysa teir av í eini ABC samgongu.

Tann drivni taktikarin løgmaður er fullgreiður yvir hesa støðu. Ódemokratiskt sigur andstøðan. Well, løgmaður er ikki samdur. Hann er fyrst og fremst valdur at tryggja sínum veljarum mestu maktina. Og amboðið er avtalan við D. Hetta nýtist tó ikki blíva endin. Men hetta er ein møguleiki, eisini um hugsað verður um, at løgmaður gongur í smáum skóm og er vorðin firtin og ónøgdur við Javnaðarflokkin eftir hansara útspæl og um løgmaður haraftrat ikki er so bangin fyri at taka Jenis uppí sum 17. mann. Sjálvandi kann hann fáa Jenis til at skykka sær væl, tí ger hann ikki tað, er hann eisini úti. Eftir alliansuna við D situr løgmaður við lyklinum. Og honum nýtist bara ein fingur hjá Jenisi til at lata upp í Tinganesi

Hetta er so faktuella støðan, ið er í andsøgn við andan í Stýrisskipanarlógini. Hvat man løgmaður sjálvur hugsa í hesi løgnu støðu? Er tað ikki ódemokratiskt, at ein so lítil flokkur sum D fær so stóra makt! Løgmaður kann heldur ikki loyva sær hetta, tí ein meiriluti av Føroya fólki hevur ynskt ein annan politikk. Er tað ikki eisini ómoralskt av løgmanni at tosa um sínar veljarar. Tí hann umboðar í hesi støðu alt Føroya fólk og ikki bara Fólkaflokkin. Hann er fólksins løgmaður og ikki Fólkafloksins løgmaður. Spurningurin er tí, um ikki Anfinnur Kallsberg misnýtir løgmanssessin til frama fyri Fólkaflokkin. Tá upptraðkar hann ikki sum ein góður demokratiskur løgmaður. Hvat við tignini, sum eigur at eyðkenna henda sess!

Tað er vanligt í øllum demokratiskum londum at hyggja eftir veljarans dómi. Verður endin tann, at tað bara verður lappað uppá samgonguna við Jenis er hetta ein knýttur nevi í andlitið á fólkaræðinum. Løgmaður hevur í fýra ár tosað um ta breiðu semjuna. Tað vóru tóm orð. Nú hevur hann so møguleikan at bøta um hetta og vísa seg sum ein sannan løgmann fyri Føroya fólk og tey mongu, sum hava sagt nei til fullveldisleist Tjóðveldisfloksins.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Kanning av »horvnum« skjølum

Leivur Hansen
býráðslimur

Undirritaði hevur sent býráðnum soljóðandi áheitan, eftir at vera lagdur undir at hava ábyrgdina av, at týdningarmikil skjøl í Tórsvallarmálinum eru horvin:

Háttvirda býráð!
Hervið verður heitt á býráðið um beinanvegin at seta eina kanning í verk til tess at fáa staðfest, hvørji týdningarmikil skjøl eru horvin, sum hava við byggingina av Tórsvølli at gera.

Á býráðsfundi 2. mei 2002 skuldsetti Heðin Mortensen, býráðslimur, undirritaða sum fyrrverandi borgarstjóra fyri at hava ábyrgdina av, at fleiri týðandi skjøl í hesum byggimálinum eru horvin.

Í grein í Dimmalætting 7. mei 2002 mælir Beate L. Samuelsen, býráðslimur, til at kanna, um hald er í hesum skuldsetingum.

Hesum taki eg fult undir við, tí eg sjálvandi hvørki kann ella vil hava slíkar skuldsetingar sitandi á mær.

Lat meg í hesum sambandi gera púra greitt, at eg als onki kenni til, at nakað skjal er horvið í hesum máli, og at skuldsetingarnar tí eru burtur úr vón og viti.

Við vón um at býráðið eftirlíkar umbøn míni um í stundini at seta eina kanning í verk av hesum viðurskiftum.

www.leivurhansen.com

Verkfalsóskil

Palli Dalsgaard

Verkfalsrættur var ein stórsigur tann tíð tað var, og verkføllini tá vóru bæði long og strong, men tá vóru verkføll neyðvendug fyri ta arbeiðandi stættina fyri at yvirliva. Tá var snøkt og greitt hungur millum fólk, so okkurt var at gera og hvørt oyra, ið fekst afturat í løn gjørdi munin.

Í dag er tíðin so ómetaliga nógv broytt, og sjálvandi skal ein hvør løn fylgja tíðini og hækka samsvarandi øllum øðrum. Men verkfall ídag er ikki av neyð, verkfall er meira ein ósemja, sum einans botnar í pástandi móti pástandi, og fyri okkum vanligu menniskjum sær tað út, sum eingin hevur ábyrgdina av einum verkfalli, farið bara til hús, og verið so leingi tykkum lystir.

Hendan ótolandi støða er næstan á hvørjum einasta ári, samtíðis sum nógvir pengar verða brúktir til at fáa frammanda fólk til landið. Ógvuliga ringt at skilja, hvat skulu frammandafólkini gera her? tá alt liggur lamið. Var tað ikki líka frætt at sagt sum var: her er verkfall, ella verður verkfall, av einum ella øðrum slag, so var eingin villeiddur. Og vit, sum enn eru so tápulig, at vit búleikast á útjaðaranum, fingu, sum í gomlum døgum, vetrarforsýning av øllum neyðsynjarvørum, so óneyðugt var við fluttningi av nøkrum sum helst.

Vit velja 32 fólk á Løgtingið fjórða hvørt ár, at eingin av teimum, sum har koma til maktina, skal tora at taka ta ábyrgd, og siga: »Hetta ber ikki til.« Tað er gott gjørt.

Brimil lá í tríggjar mánaðir. Skal nú landsins floti liggja líka leingi? So hava vit ikki nógv at gleða okkum til, nú summarið er komið.

Eingin virðing fyri suðuroyingum!

Hanna Pálsdóttir Vang

Enn eina ferð síggja vit ta manglandi virðingina fyri suðuroyingum. Hesu ferð er tað verkfallið hjá skippara- og navigatørfelagnum, sum er orsøkin. Um tingmenn løgdu í, kundu teir saktans tikið stig til, at Suðuroyggin má fáa undantaksloyvi, tá verkfall er. Tað er líkamikið, hvat fyri verkfall er, so gongur tað harðast út yvir suðuroyingar. Tað eru nógv dømi: postur og handilsvørur koma ikki fram, fólk sleppur ikki norðureftir uttan at betala í dýrum dómi og brævatkvøðurnar, sum vórðu sendar 24-04 náddu ikki fram til tíðina (t.e.30-04), og vórðu tí ógildar. Tað er ikki suðuroyingar, tað skal ganga út yvir, tí Karsten Hansen ella Fíggjarmálastýrið eru líkaglað, um suðuroyingar ikki sleppa norðureftir í týdningarmiklum ørindum ella um suðuroyingar ikki fáa post rættstundis o.s.fr.

Manglandi virðing síggja vit bæði frá tingmonnum og frá fjølmiðlunum. Fjølmiðlarnir nevna nóg illa verkfallið við einum orði; tað sum hevur áhuga í Føroyum er opinbart bara miðstaðarøkið. Útjaðarin kundi tað sama farið í luftina, uttan at nakar legði merki til tað.

Men sum so mangan finna suðuroyingar seg bara í at verða behandlaðir uttan virðing, tí tað eru teir so vanir við.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Várkonsertir við Eystankórinum

Eystankórið á konsert í Fríðriksikirkjuni

TÍÐINDASKRIV
Eystankórið

Eystankórið fer hesa vikuna, at hava tríggjar várkonsertir. Tann fyrsta verður í Fríðrikskirkjuni Kristi Himmalferðardag kl. 16.

Sunnudagin hevur Eystankórið tvær konsertir. Tann fyrra verður í Gøtu kirkju kl. 16, meðan tann seinna er í Glyvra kirkju sama dag, kl. 19.

Kórið hevur í gjøgnum veturin vant eina heilt nýggja skrá, ið m.a. inniheldur tað sera vakra latínska verkið "5 Latinske Kirkekor" eftir norðmanninum Arild Sandvold. Umframt hetta sum høvuðsverk, fer kórið at framføra føroyskar vár- og summarsangir, og hevur eisini nøkur ensk verk á skránni.

Eystankórið telur uml. 30 sangarar og verður stjórnað av Símun Hammer.

Saman við kórinum vil Heðin Kambsdal eisini luttaka við orgulfylgispæli.

Kórið bjóðar øllum velkomnum til hesar konsertir.

Lymfødemfelagið havt ársaðalfund

TÍÐINDASKRIV
Lymfødemfelagið

Tann 10. apríl hevði Lymfødemfelagið aðalfund, og tveir nevndarlimir, Eyðbjørg Djurhuus og Fía í Túni, og Elsa Wolles, tilkaslimur, stóðu fyri vali. Fía í Túni tók við afturvali, meðan Eyðbjørg Djurhuus og Elsa Wolles ikki ynsktu afturval. Úrslitið var, at Harriet Nybo varð vald í nevndina, meðan Eyðbjørg Djurhuus varð vald sum tiltakslimur.

Nevndin hevur skipað seg við Henny Biskopstø sum formanni, Arnhild Johannesen sum næstformanni, Fíu í Túni sum kassameistara, Áslu Stenberg sum skrivara og Harriet Nybo sum nevndarlimi. Tiltakslimir eru Minna á Hædd og Eyðbjørg Djurhuus.

Felagið hevur nú 6 ár á baki og hevur 55 limir.

Til ber at tekna seg sum lim hjá einum av nevndarlimunum.

VIÐMERKINGAR

Kollveltandi táttir og arbeiðsskapandi verkætlan!

Hans Birgir Hansen
Mr. Big

Eg havi nú í umbúna at taka upp aftur táttin við politiska flokki »Tey grønu í Føroyum«, so vit fáa skapt veruliga náttúru-, umhvørvis-, djóra- og plantuvernd.

Eg havi somuleiðis í umbúna at taka tann orkusparandi táttin upp aftur, ið byggir á decentrala orkuskipan í øllum landshúsarhaldinum og tiltikna kubbasparing.

Eg havi somuleiðis í umbúna at taka upp aftur altjóða arbeiðsskapandi verkætlan, hvørs øll seriøs, virkisfús, motiverað hjún/einstøk, kunnu gerast altjóða sølufólk.

Eg havi gingið undan at gera eitt stórt slóðbrótandi arbeiði so fortreytir/grundarlagið er skapt fyri at fremja nevndu táttir og altjóða arbeiðsskapandi verkætlan.

Eg havi áður nýtt nógvar kropsliga orku, tíð og pening til slíkt slóðbrótandi arbeiði og til marknaðarføring í bløðum, útvarpi, sjónvarpi og við lýsingum.

Eg havi ikki verið tikin í nóg stórum álvara av almenninginum, bløðum, útvarpum, sjónvarpi, myndugleikum, vøldum, fakfeløgum og føroysku vinnuni í Havnini.

Eg havi møtt nógvum forðingum/mótarbeiðan á vegnum við »Tey grønu« og orkusparandi táttin og altjóða arbeiðsskapandi verkætlan ein vil taka upp aftur.

Eg havi áður víst á, hvussu grundleggjandi skeivt og órættvíst alt er skipað í øllum landinum og hvussu murran er í flest øllum frá børn til fólkapensjónistar.

Eg havi víst á, hvussu skaðiligt lívshóttalagi føroyinga er í dag við dálkingar trupulleikum í okkara føðiketu, luftini, drekkivatni, drykkju-, mat- og nýtsluvørum.

Eg havi víst á, hvussu skaðiligur heilivágur, rúsdrekka, tubbak er fyri fólkaheilsuna hjá øllum føroyingum.

Eg havi áður sjálvur figgja slíkt, ein hevur havt frammi í føroysku bløðunum í gerst aktuelt í øllum almenna og politiska kjakinum, ið øll skulu fáa at síggja.

Myanmar/Burma:

Aung San Suu Kyi leyslatin

TÍÐINDASKRIV
Annika Sølvará, forkvinna Amnesty International Føroya Deild

Amnesty fegnast um, at hernaðarleiðslan í Myanmar hevur latið Aung San Suu Kyi, leiðara fyri tjóðskaparligu samgonguni fyri demokrati, NLD, leysa eftir at hon hevur sitið í húsavarðhaldi í meira enn 1 1/2 ár. Loyniliga samrøður hava verið millum Aung San Suu Kyi og stjórnina, men tað er óvist, hvat partarnir hava samst um.

NLD vann við stórum meiriluta demokratiska valið í 1990, men hernaðarleiðslan vildi ikki geva valdið frá sær. Í staðin vóru túsundtals limir í NLD handtiknir og enn fleiri vóru noydd at fara úr flokkinum.

Aung San Suu Kyi sum fekk Nobel friðarheiðurslønina í 1991, hevur sitið í húsavarðhaldi mesta partin av 90árunum. Leyslatingin prógvar, at tað ger mun at mótmæla, men enn eru umleið 1.600 politiskir fangar í landinum og Amnesty krevur, at teir verða leyslatnir beinanvegin og treytaleyst ella fáa eina rættvísa rættarviðgerð.

Limir í Amnesty um allan heim hava í 10 ár arbeitt fyri rættindum teirra og fara ikki at gevast við arbeiðinum fyrr enn allir eru latnir leysir.

Amnesty hevur leingi gjørt vart við álvarsligu mannarættindastøðuna í landinum. Torturur verður brúktur miðvíst og fongsulsviðurskiftini eru út av lagi vánalig. Minnilutabólkar verða undir torturlíknandi umstøðum noyddir at byggja vegir, jarnbreytir og demningar ella at arbeiða sum berarar hjá herinum.

Umheimurin má ikki gloyma Myanmar og fólkið har, sum livir undir svárum korum. Tað er alneyðugt at halda fram at mótmæla viðurskiftunum og gongdin í landinum má fylgjast neyvt.

www.amnesty.fo

Føroya Pro Vita – 10 ár á baki

TÍÐINDASKRIV
Føroya Pro Vita

Føroya Pro Vita varð stovnað í Gøtu skúla tann 12. juni 1992.

Pro Vita ynskir, og arbeiðir fyri, at menniskjavirði verður fasthildi og virt frá giting til náttúrligan deyða.

Hesi 10 árini Føroya Pro Vita hevur verið til, hevur felagskapurin havt eina ráðgevingartænastu, gjørt undirvísingartilfar til skúlarnar, og biðið fólk við sera góðum førleikum, úr ymsum londum, at lýsa spurningin um menniskjavirði innan medisinsk-etisk økir og onnur viðkomandi evnir.

Millum hesi evnir kunnu nevnast:

- Fosturdráp.
- Tann horvni pápin.
- At vera foreldur at einum barni við Downsyndromi.
- Iðranarbollin - Angribollin
- Eutanasi (samkensludráp)
- Umsorgan fyri doyggjandi
- Gen-gransking
- Reproduktiónsteknologi
- Post-abortion Syndrom

Í samband við 10 ára dagin hevur Føroya Pro Vita bjóða Torben Riis, lektara, at gera støðuna upp, hvar vit, í okkara parti av heiminum eru, tá tað snýr seg um gongdina innan menniskjasýn og etikk. Harafturat, at vísa á vegin frameftir í arbeiðinum fyri at fasthalda virðingina fyri menniskjalívi.

Torben Riis luttekur á ársfundinum hjá Føroya Pro Vita, saman við konuni, Ingegerd Riis, ið er formaður í Respekt for Menneskeliv, sum er danskur systurfelagskapur hjá Føroya Pro Vita.

Ársfundurin verður hildin á HF- & Studentaskúlanum á Kambsdali 11.mei 2002, kl. 13.30.

Eftir fyrilesturin hjá Torbeni Riis, verður aðalfundur hildin sambart viðtøkum felagsins.

Øll eru vælkomin.